

Eldborg í Eysturafrika

# Samstarv: Statoil og Skansi gott hál í Eysturafrika

**Jan Müller**

06.12.2013 - 22:09

Oljan.fo

Tað gongur bara rætta vegin hjá norska oljufelagnum Statoil í royndunum at finna olju og gass í Eysturafrika. Eftir at hava rakt við gass í fleiri boringum, hevur Statoil nú enn einaferð gjørt eitt gassfund, sum ger norska gassævintýrið í Eysturafrika enn meira spennandi.

Og fyri føroyingar hevur hetta eisini nakað at siga. Tó at vit ikki eru eigari í loyvunum, so hevur eitt av veitaraskipunum hjá føroyska Skansi Offshore ein týðandi leiklut í arbeiðinum út fyri Tanzania.

Talan er um veitingarskipið Eldborg, sum í løtuni liggur á gassleiðunum í Eysturafrika og hjálpir Statoil og ExxonMobil at koma so væl frá boringunum har sum gjørligt.

Nýggjasta fundið er tað fimta í røðini og sær ein komandi útbygging av hesum fyrsta gassfeltinum í Eysturafrika til at koma nærri og nærri.

Statoil eigur 65% av loyvunum, har gass er funnið og ExxonMobll 35%.




